# Ikast var ov stórur gloypibiti

**Danska hondbóltsliðið Ikast Bording, sum vitjaði í Føroyum um vikuskiftið, var ein alt ov stórur gloypibiti hjá bæði Stjørnuni og føroyska kvinnulandsliðnum.**

HONDBÓLTSVITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Nicolina Eyðbjørnsdóttir var við á føroyska liðnum á Hálsi leygardagin, og í næstum fer vestmannakvinnan til Spania, har hon skal royna eydnuna sum yrkisleikari.*

*mynd: Finnur Justinussen*

Ikast Bording spældi tveir dystir á Føroyaferðini. Fyrri dysturin var móti føroyameistarunum úr Stjørnuni í Klaksvík fríggjakvøldið, og seinni dysturin var móti kvinnulandsliðnum í høllini á Hálsi leygardagin.

### Ikki sterkasti hópurin

Tað sást ikki aftur úti á vøllinum, at danska liðið júst er farið undir venjingarnar aftur eftir summarsteðgin, og at fleiri nýggir leikarar vóru á liðnum. Hópurin hjá Ikast Bording á Føroyavitjanini var heldur ikki tann sterkasta, ið felagið kann mynstra. Tað er nevnliga so, at OL byrjar um fáar dagar, og millum annað eru fimm leikarar úr Ikast Bording við danska landsliðnum til OL í Athen. Tað eru tær fimm Kristine Andersen, Line Daugaard, Karen Mortensen, Karen Brødsgaard og Josefine Touray, ið allar eru fastar fúsar á landsliðnum. Harumframt er norska Gro Hammerseng farin til Athen við norska landsliðnum.

Hetta eru alt leikarar í heimsflokki, og lítið man verða at ivast í, at vóru hesar eisini við á vitjanini í Føroyum, so høvdu tey bæði føroysku liðini av álvara fingið oyruni í maskinuna.

### Betur undirhald í Klaksvík

Fyrri dysturin hjá Ikast Bording í Føroyum var sum áðurnevnt í Klaksvík fríggjakvøldið, tá mótstøðuliðið var føroyameistararnir úr Stjørnuni. Teir nógvu áskoðararnir í KÍ-høllini fingu ein rættuliga undirhaldandi dyst, hóast tað var stórur munur á liðunum báðum.

Sum skilst var dysturin fríggjakvøldið í løtum rættuliga væl leiktur, og góð ferð var á dystinum. Sjálvsagt var munurin á liðunum stórur, og 38-20 sigurin til Ikast talar eisini fyri seg.

Eisini til dystin í Havn leygardagin vóru nógvir áskoðarar. Hesin dysturin var tó ikki serliga væl leiktur, og tað sást væl, at leikararnar úr Stjørnuni, sum eisini eru á landsliðnum, vóru moyrar eftir dystin kvøldið fyri. Ikast var ein alt ov stórur gloypibiti hjá einum føroyskum landsliði, sum als ikki er í dystarvenjing, og tí gjørdist munurin eisini rættuliga stórur. Ikki tí, tað tóktist ikki sum um, at donsku gestirnir overvaðu seg í dystinum, tí leikferðin var ikki serliga høg.

### Sá lætt út

Tað var tó hugtakandi at eygleiða danska liðið, tí tær høvdu so ómetaliga lætt við at spæla seg til opnar møguleikar. Tað sá so leikandi lætt út hjá Ikast, sum í veruleikanum megnaði at hava eina roynd upp á mál í hvørjum einasta álopi. Donsku kvinnurnar broderaðu seg gjøgnum føroysku verjuna, og í flestu førunum vóru føroysku málverjarnir prísgivnir.

Leikararnir á føroyska landsliðnum tóktust tó verða í rímuliga góðari venjing, men tað skerst ikki burtur, at fleiri teirra vóru eitt sindur „rustaðar", tí at avleveringar og skot sótu ikki eins væl, sum tey plaga at gera.

At tað eisini er eitt stórt lop frá føroyska kvinnulandsliðnum til oddin av donskum hondbólti, kom kanska einabest til sjóndar, tá ið hugt varð eftir skotstyrkini hjá liðunum báðum. Tað var so nógv meiri „saft og kraft" í skotunum hjá donsku leikarunum, og tá ið havt verður í huga, at allarhelst besti skjúttin hjá Ikast Bording, Kristine Andersen, ikki var við í Føroyum, kann bert staðfestast, at munurin er stórur. Okkara leikarar royndu tó at gera, hvat tær vóru mentar, men tá ið samanum kom, vann Ikast Bording ein trivaligan 35-19 sigur á føroyska kvinnulandsliðnum.

Vitjanin hjá danska liðnum var ógvuliga forvitnislig, og tað er ikki á hvørjum degi, at føroyskir hondbóltsáskoðarar fáa høvi at síggja so sterk lið her á klettunum. At vitjanin eisini hevur týdning fyri føroyskan hondbólt, er einki at ivast í. Tað er júst slíkir dystir sum hesir, ið geva leikarunum hug til at dríva á við venjingini. Vóru ikki slíkar avbjóðingar, hevði hugurin hjá leikarunum til at gjørt nakað við hondbóltin óivað ikki verið tann sami.

## Væl nøgdur við dystirnar

**Venjarin hjá Stjørnuni og føroyska kvinnulandsliðnum, Rógvi Nielsen, er væl nøgdur við dystirnar móti Ikast Bording um vikuskiftið.**

HONDBÓLTSVITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Havnarmaðurin Rógvi Nielsen, ið stendur á odda fyri bæði føroyameistarunum úr Stjørnuni og føroyska kvinnulandsliðnum, fekk í vikuskiftinum av álvara sæð, hvørjar dygdir eru í liðunum báðum hjá honum, tá ið danska stórliðið Ikast Bording vitjaði.

### Sær klassamunin

Rógvi Nielsen var væl nøgdur við báðar dystirnar. Hann heldur, at dysturin í Klaksvík, tá ið Stjørnan royndi seg móti danska liðnum, var betur enn dysturin í Havn, men hann heldur tó, at í báðum førum fingu áskoðararnir nakað fyri pengarnar.

- Hetta er eitt lið í heimsflokki, og tað er einki at taka seg aftur í, at man sær hvussu høgt støði er í donskum hondbólti, sigur Rógvi Nielsen. Venjarin sigur, at tá ið man spælir móti so sterkum liðum, ræður tað um ikki at gera feilir, tí teir verða revsaðir beinanvegin, sigur Rógvi Nielsen.

At tað sá so lætt út hjá danska liðnum, er Rógvi Nielsen ikki ósamdur í, og hann heldur, at tað tóktist sum um, at leikararnir hjá Ikast Bording allatíðina áttu eitt eyka gear, um tørvur var á tí.

### Eingir landsdystir í næstum

Føroyski landsliðsvenjarin greiðir frá, at hann hevði vónað, at føroyska landsliðið fekk høvi at royna seg í landsdysti seinni í ár, men tíverri sær tað ikki út til at gerast veruleiki, sigur hann. - Sum tað sær út í løtuni, so verður neyvan nakar dystur aftur á skránni hjá landsliðnum fyrr enn einaferð komandi ár, sigur Rógvi Nielsen.

Hetta merkir tó ikki, at føroysku landsliðsleikararnir liggja taka sær av løttum, tí tær savnast til felagsvenjing einaferð um mánaðin, sigur Rógvi Nielsen. So er bert at vóna, at tað ikki fer at ávirka hugin hjá føroysku leikarunum, at tað ikki eru nakrar avbjóðingar fyri framman næstu mánaðirnar.



# Jákup er skaddur

**Tað er møguleiki fyri, at Julian Johnsson kann koma í tíðarneyð undan landsdystinum ímóti Malta**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað er rættuliga ivasamt, um Jákup Mikkelsen, KÍ málverjin, verður førur fyri at vera við, tá ið Føroyar og Malta mikudagin í næstu viku skulu spæla vinardyst á Svangaskarði.

Jákup Mikkelsen varð skaddur, tá ið tað restaði ein lítil løta av uppgerðini ímóti B36. Jákup tykist hava fingið ein vøddaskaða í baklærinum. Í gjár var hann hjá fysioterapeuti, men tá var ikki greitt, hvussu stórur skaðin er, og harvið hvussu long tíðin verður, áðrenn Jákup verður førur fyri at spæla aftur.

Í Klaksvík kvíga tey fyri, at málverjin ikki verður førur fyri at spæla, tá ið KÍ sunnudagin skal á Mølina á Eiði.

Í landsliðshøpi verður eingin avgerð tikin um annan málverja, fyrrenn tað er greitt, um Jákup ikki verður førur fyri at spæla, og hann hevur givið avboð.

Næstu málverjarnir í røðini eru ivaleyst Bárður Johannesen í HB og Bjarni Johansen í VB. Tá ið Bárður leingi hevur verið skaddur, og tá ið Bjarni hevur staðið framúr væl síðstu vikurnar, kann tað kanska roknast við, at VB málverjin er eitt sindur betri fyri.

Julian Johnsson og ÍA skulu mikukvøldið spæla í UEFA Cup í Svøríki. Tí verður í Íslandi roknað við, at landskappingardysturin hjá teimum í vikuskiftinum fer at verða útsettur. Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er, at dysturin verður fluttur til mánakvøldið í næstu viku. Um tað verður soleiðis, so verður tað torført hjá Juliani at vera í Føroyum fyrrenn seint týskvøldið, og tað verður ikki optimalt fyri fyrireikingarnar til landsdystin.



*Ivasamt er, um Julian Johnsson verður at síggja á føroyska landsliðnum, sum í komandi viku skal dystast við Malta á Svangaskarði*

*savnsmynd*

## Cross-renning

*á Ovastevnu 7. august 2004*

**Dreingir -7 (f. 97-) 560 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2,49 | Teitur | Poulsen | 1997 | Nólsoy |
| 2 | 2,51 | Sólbjørn | Hansen | 1997 | Nólsoy |
| 3 | 3,27 | Torkil Sørin | Jógvansson | 1999 | Nólsoy |
| 4 | 4,07 | Betuel R. | Hansen | 1997 | Roysnið |
| 5 | 6,06 | Poul Torgarð | Búgvason | 2001 | Nólsoy |

**Dreingir -10 (f. 94-96) 1.120 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 5,29 | Jóhan | Hansen | 1994 | Nólsoy |
| 2 | 5,55 | Jón | Múller | 1994 | Kvívík |
| 3 | 7,57 | Baldur | Meidel | 1994 | Havn |

**Gentur -10 (f. 94-96) 1.120 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6,23 | Sissal | Skaale | 1994 | Bragdið |
| 2 | 7,20 | Anna Malan | Jógvansdóttir | 1995 | Nólsoy |
| 3 | 8,11 | Milja | Skaale | 1996 | Bragdið |

**Dreingir -13 (f. 91-93) 1.120 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4,47 | Hákun | Hansen | 1992 | Bragdið |
| 2 | 5,28 | Sigmund | Nólsoy | 1992 | Nólsoy |
| 3 | 5,30 | Hjørtur | Búgvason | 1991 | Bragdið |
| 4 | 6,40 | Hanus Pál | Jógvansson | 1992 | Nólsoy |
| 5 | 7,39 | Hans Jakku | Davidsen | 1993 | Kvívík |

**Gentur -13 (f. 91-93) 1.120 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7,10 | Rakul | Joensen | 1992 | Nólsoy |
| 2 | 7,14 | Maria | Poulsen | 1992 | Nólsoy |

**Dreingir -17 (f. 87-90) 2.240 m**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 10,53 | Høgni | Jensen | 1988 | Kvívík |

**Menn (f. 59-86) og veteranar (f. -58) 5,04 km**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 26,12 | Robert | Vilhelmsen | 1951 | Bragdið |
| Vet. 1 | | | | | |
| 4 | 30,26 | Jógvan | Thomsen | 1960 | Nólsoy |
| 2 | 27,28 | Jákup | av Skarði | 1973 | Nólsoy |
| 3 | 28,23 | Búgvi | Jacobsen | 1966 | Nólsoy |
| 5 | 32,45 | Sjúrður P. | Joensen | 1965 | Havn |

**Kvinnur (f. 59-86) 5,04 km**

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árg. | Felag/bygd |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 35,06 | Ann-Mari | av Skarði | 1974 | Nólsoy |
| 2 | 37,26 | Gyða | Skaale | 1981 | |

# NSÍ álopsstyrk úr Nigeria

**Runavíkingar hava fingið tilgongd av einum nigerianskum áleypara, sum væntandi var við í hópinum hjá NSÍ til dystin móti ÍF gjárkvøldið.**

LEIKARATILGONGD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er um 20 ára gamla Onyema Ikechukwu, sum áður hevur leikt í eitt nú Suðurafrika. Nigerianarin, sum bara verður róptur Ike, hevur leikt tveir dystir á nigerianska U21-landsliðnum og tveir dystir á nigerianska U23-landsliðnum.

Formaðurin í NSÍ, Jákup Mortensen, sigur, at øll pappírini eru komin í rættlag, so at ungi nigeriumaðurin kann verða við í dystinum móti ÍF.

Tað er eingin loyna, at tað hevur gingið heldur striltið hjá runavíkingum at umseta møguleikar til mál, og er nýggi álopsleikarin óivað ætlaður at verða við til at loysa henda trupulleikan. Sum skilst er talan um rættuliga sterkan spælara, sum er bæði sterkur við høvdinum og eisini hevur eitt gott skot.